# TILTØK

### Gudstænastur 29. nov.

**Havnar kirkja:** kl. 11 Sonja Klein. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna.
**Hoyvík:** kl. 11 Bjarni Bæk. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómans-kirkjuna. Sunnudagsskúli verður undir gudstænastuni.
**Kaldbak:** kl. 12 Ann D. Hansen. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna.
**Vesturkirkjan:** kl. 11 Heri Joensen. Dropar syngja. Kirkjukaffi. Okkurt gott til børnini eisini. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Føroysku sjómanskirkjuna.
**Argja kirkja:** kl. 11 Bergur D. Joensen. Sunnu-dagsskúlabørn ganga Luciu, og barnakórið syngur. Kirkju-kaffi. Okkurt gott til børnini.
**Christianskirkjan:** kl. 11 Magnus Brahé Jørgensen, altarg. Nýggjur Messuakul. Talvan gongur fyri Sjómans-kirkjuni. Konfirmantarnir várið 2010 byrja at ganga til hósdagin 26. nov. kl. 17 í kirkjukjallaranum. Tilfar og kunning. Foreldur eru vælkomin við.
**Fríðrikskirkjan:** kl. 11 Familjuguðstænasta. Øll vælkomin til morgunmat kl. 09.30 (Kirkjan fyllir 15 ár)
**Fuglafjørður:** kl. 12 familjugudstænasta, Uni Næs saman við sunnudags-skúlanum. Eftir gudstænast-una adventshugni í kirkju-kjallaranum.
**Tvøroyri:** kl. 11 Símun P. Jacobsen
**Hvalba:** kl. 12.30 Símun P. Jacobsen
**Sandvík:** kl. 18 Símun P. Jacobsen
**Gøta:** kl. 12.30 Familjuguðstænasta (offur-gongd fyri kirkjuna). Øll væl-komin til morgunmat kl. 10.
**Vágur** kl. 11 & **røktar-heimið á Tvøroyri** kl. 16 & **sjúkrahúsinum** kl. 17, Patrick de Neergaard. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna.
**Bøur:** kl. 11 David Johannesen.Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna.
**Glyvra kirkja:** kl. 11 gudst. og sunnudagsskúli, altargangur, Meinhard Bjartalíð. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna.
**Rituvíkar kirkja:** kl. 19 »Teir sjey lestrarnir«. Eftir gudst. verður adventshugni í missiónshúsinum.
**Haldórsvík:** kl. 12 Niels Pauli Danielsen.
**Kvívík:** kl. 12 Theodor E. D. Olsen, barnaguðstænasta.
**Sjóvar kirkja:** kl. 12 Henning Bøgesvang.
**Selatraðar kirkja:** kl.16 Henning Bøgesvang (Kingokórið syngur) Aftan á verður kirkjukaffi í missiónshúsinum.
**Eiði:** kl. 12 Emil Olsen, messa.
**Norðskála:** 12 Sverri Steinholm, gudst. og altarg. Heri Kjerbo prædikar.
**Mikladalur:** kl. 12 Hanus á Gørðum altarg. Talvan gongur fyri Føroysku sjómanskirkjuna.
**Viðareiði:** kl. 12 Elsa Funding
**Sandur:** kl. 12 Jákup R. Hansen, altarg. Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna.
**Vestmanna:** kl. 11 Inga Poulsen Dam, familjugudstænasta.

### Hoyvíkar kirkja
Sunnudagin kl. 16, verður eitt felagskirkjuligt tiltak í Hoyvíkar kirkju. Tað eru Oasan, Lívdin og Hoyvíkar kirkja, ið skipa fyri.
*Á skránni er:* børn úr Oasuni, Lívdini og Hoyvíkar kirkju fara at framføra jólaevangelið sum sangleik. Sunnudagsskúlabørn úr Hoyvíkar kirkju, kór úr Oasuni og Lívdini fara at syngja, og nakrar gentur úr Lívdini fara at framføra drama. Tiltakið byrjar kl. 16 og aftaná eru øll vælkomin í kirkjukjallaran til kaffi og eplaskivur.
Hósdagin 17. des. kl. 19.30 hevur Føroya Musikkskúli konsert.
Sunnudagin 20. des. kl. 16 hevur kórið "Tarira" jólakonsert

### Katólska kirkjan
Fríggjadagin kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/Paul Marx, prestur í Mariukirkjuni. Kl. 14 sunnudagsskúli. Millum kl. 15 og 18 er tað tilbiðjan av Heilaga Sakramentinum her í kirkjuni.
Hóskvøld 3. des. kl. 20 verður Taizé kvøld í Kerit. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.katolsk.fo

### Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 bíbliu-søgutími fyri børn og bíbliu-gransking. Kl. 11 dópsguds-tænasta, Jens V. Danielsen.

### Mikladals kirkja
Møti verður leygarkvøldið kl. 19 við Pól Jóhannessen og ungum úr KFUM & K í Klaksvík. Øll hjartaliga vælkomin.

### Kambsdalur, Handilsskúlin
Sunnumorgun kl. 11 Breyðbróting.
Týskvøldið kl. 20 Bønar-og uppbyggingarmøti.

### Bygdahúsið á Húsum
Møti verður sunnudagin kl. 16 við Niels Andreassen, Pól Jóhannessen og øðrum úr KFUM & K í Klaksvík. Øll hjartaliga vælkomin.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Jóhan Petur Johannesen.
Sunnudagin kl. 17, Møti við Helga Abrahamsen. Sangur við Oddbjørg Poulsen. Barnamøti kl. 17. www.keldan.fo

### Evangeliihúsið, Tróndargøta
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við barnavæl-signilsi og sunnudagsskúla, barnakórið syngur.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti

### Aglow, Havn
bjóðar til nátturða og jóla-hugna á Hotel Føroyum sunnukvøldið kl. 19.30. Luttøka verður úr Skopun. Tilmelding við at senda sms ella at ringja á telefon 214088 ella 259396 Kostnaður 100 kr. Kvinnur og menn verið hjartaliga vælkomin.

### Aglow Suðuroy
Leygarkvøldið 5. des. kl. 19.30 verður jólafundurin í Handverkarafelagnum á Tvøroyri. Jógvan og Dagny luttaka. Øll eru vælkomin.

### Vágur/Bethel
Sunnukvøldið Evangelisk møti kl. 18, talarar Osvald Kjærbo og Svein Petersen.

### Lopra/ Bygdahúsið
Mánakvøldið evangelisk Møti kl. 20. Osvald Kjærbo, Svein Petersen o.a tala og syngja.

### Lívdini *í Hoyvíkar Skúla*
Sunnudagin bjóða vit tær at vera hjartaliga vælkomnan á møti. Familjumøtið kl. 10.30, tilbiðjanar- og lærumøtið kl. 12. Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi verða við á møtunum. Á familjumøtinum verður samrøða við Annu og Símun Pætur. Á seinna møtinum talar Símun Pætur. Ímillum møtini er samverða við drekka og onkrum aftur við. Eisini verður lovsongs- og tilbiðjanarløta og minnismáltíð Harrans.. Barnaansing er undir báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12 samstundis sum tað seinna møtið er.
Mánadagin, 30. nov. Barnasangkór kl. 16.15-16.45. Hetta kór er byrjað í Lívdini fyri børn í aldrinum 5-12 ár, vant verður í hølunum á Brekku hvønn mánadag frá kl. 16.15 til kl.. 16.45. Tey, sum ynskja at verða við í kórinum, skulu bara møta upp í hølunum á Brekku 3 í Hoyvík. Lívsdroparnir verða kl. 16:45 í hølunum á Brekku 3 í Hoyvík. Lívsdropar er handaligt arbeiði fyri børn úr 1. til 7. flokk.
Fyri øll nýggj í Lívdini kl. 20 "Samkomulív og samfelag" - hvat er og hvat ger Lívdin? Er pláss fyri mær og míni familju har? Kl. 20 bjóða vit øllum, sum nýliga eru byrjað at koma í samkomuna og umhugsa at gera Lívdina til sítt andaliga heim. Tiltakið verður á Brekku 3 Øll, sum eru nýggj í Lívdini og hava gjørt ella umhugsa at gera Lívdina sítt andaliga heim eru hjartaliga vælkomin! www.livdin.fo
Týskvøldið 1. des. Eru húsbólkar og er tí onki tiltak á Brekku. www.livdin.fo www.ung.livdin.fo

### G.H.M.
Sunnukvøldið kl. 20 hevur G.H.M. konsert í Hoyvíkar kirkju. Ókeypis atgongd. Øll eru vælkomin.

### Kirkju- og missións-húsinum á Argjum
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Jógvan og Helen, Jónhild og Bent tala og syngja.

### Filadelfia, *Landavegur 22*
Leygardagin kl. 21 Flare
Sunnudagin kl. 11 Morgun-møti v/sunnudagsskúli, Hánd i hanske v/Tummas Jacobsen www.filadelfia.fo

### Filadelfia Vágar
Sunnudagin
kl. 11 Møti við Mariann Jacobsen.
Kl. 11.30 Sunnudagsskúli.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

### KFUM & K í Klaksvík
Sunnudagin
kl. 14 Sunnudagsskúlin
kl. 17.30 Bønarløta
kl. 18 Dulos-toymið
kl. 21 Ungdómsmøti

### Sjómanskvinnuringurin á Runavík, Rituvík og Hellunum
koma saman í missiónshúsin-um á Glyvrum mánakvøldið kl. 19.30. Jonna Johannesen sigur frá. Mint verður á jólapakkarnar til sjófólki. allar kvinnur eru vælkomnar.

### Leynar
Sunnudagin kl. 18 verður møti í skúlanum við Jónhildu og Gullak Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Soli deo Gloria
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ungdómsbólkinum.

### Ebenezer
Sunnukvøldið kl. 11 Minnis-máltíð Harrans – Talari: Oddmar Færø – Evni: 1. Kor 11-12. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangeliskt møti www.ebenezer.fo

### Fríkirkjan Oasan
*Kirkjustræt*
Fríggjakvøldið kl. 20 After8.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Juliu Zachariasen.
Kl. 12 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið
Kl. 16.15-17 Barnakórið
Kl. 17-18 Ungdómskórið
Kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

### Bethel, Vágur
Fríggjakvøldið
kl. 21 Ungdómsmøti.
Øll eru vælkomin
Sunnudagin
Kl. 11 Breyðbróting
Kl. 12.30 Sunnudagsskúli
Kl. 18 Evangeliskt møti. Svein Petersen og Osvald Kjærbo tala.
Øll eru vælkomin.

### Marknaðardagur á Fossánesi
Byrjar leygardagin kl. 14. Har verður loppumarknaður, tombula, kafé, fiskibrunnur, ponyríðing og ymiskir sølu-básar inni í høllini og annað.

### Frelsunarherurin Tórshavn
Sunnudag kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Kl. 18 FAMILJU-TÍMI, drekka-munnur aftaná. suppa, sápa og frelsa síðan 1865.

### Frelsunarherurin Vágur
Sunnudagin kl. 11 morgun-møti/sunnudagskúli kl. 18 evang.møti Ben Eli og fleiri.
Mánadagin kl. 20 bønarløta.
Týsdagin kl. 9.30 orðið á borðið kl. 20 heimaforbundi.

### Samkoman við Marknagil
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Sunnudagin
Kl. 10.30 Breyðbróting.
Kl. 12 Sunnudagsskúli.
Kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin Morgunmøti við breyðbróting, kl. 11.

### Thabor, Fuglafjørður
Í samb. við føðingardagin hjá Thabor verða hesi møtir:
Leygarkvøldið kl. 19 Niels Jacob Nielsen, trúb., talar. Drekka aftaná.
Sunnukvøldið kl. 18 Niels Jacob Nielsen, trúb., talar. Náttverði aftaná.
Bæði kvøldini verður innsavnan fyri húsið.

### Tabor, Toftir
Leygarkvøldið kl. 20 verður ungdómsmøti. Petur Martin Glerfoss kemur at tala um Náðigávur. Hjartaliga vælkomin.

### Getsemane, Stangaskákið 1
Leygarmorgun kl. 10 er morgunbøn.
Sunnukvøldið kl. 18 er møti. Barnamøti er samstundis. Hvønn gerandismorgun kl. 06.15 er morgunbøn.

### Lívsins orð, Saltangará
Sunnudagin kl.10.30 Møti Øll hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsinum við Landavegin
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/Johan Henriksen

### Missións- og Ungdóms-húsið á Glyvrum
Fríggjadagin kl. 21 Ungdóms-møtið v/Lív Johannesen Innsavnan til ungdomsarbeiðið.
Sunnudagur kl. 17 Sangmøti, Heimligar kreftir. Sunnudagsskúli niðriundir. Um tær manglar fart, so ring á tlf. 447090 ella 775091

### Kollafjarðar Missiónshús
Sunnudagin kl. 14 og møti kl. 18 verður sunnudagsskúli.
Mánadagin kl. 18 venur barnakór. Øll børn eru vælkomin.
Týskvøldið kl. 20 verður Bíbiltími v/Eivin Mouritsen.
Hóskvøldið kl. 19.30 verður Bønarløta.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missónshúsið í Hvalba
Leygarkvøldið Møti kl. 20 við Helgi Hróbjartson Íslandi.
Sunnukvøldið Møti kl. 18 við Helgi Hróbjartson. Innsavnan til arbeiðið.
Mánakvøldið Møti kl. 20 við Helgi Hróbjartson.
Týskvøldið Møti kl. 20 við Helgi Hróbjartson. Innsavnan til arbeiðið.

### Missiónshúsið í Sørvági
Fríggjadagin Einki ungdóms-møti vegna smábólkar.
Sunnudagin Møti kl. 18 við Ingu og Edith.
Øll eru hjartaliga vælkomin. www.libanon.fo

### Missiónsvika í Funningi
*26 – 29 nov. 2009*
Fríggjakvøldið kl. 20 Sylverius jacobsen talar Tær úr Vík syngja.
Leygarkvøldið kl. 20 Tórfríður Magnussen talar Magda og Maibritt syngja.
Sunnukvøldið kl. 18 Regin Høgnesen talar. Jóhan Edvard og Páll Suni syngja. Innsavnan til Heima-missiónina. Bønarmøti er ½ tíma áðrenn møti.

### Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin kl. 14.30 verður sunnudagsskúli og kl. 18 verður møti við Petur S. Jacobsen – Ungur í tænastuni. Øll eru vælkomin.

### Missiónshúsið í Hvalvík
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli.
Kl. 18 Møti við Rigmor og Hera Tróndheim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Týskvøldið kl. 20 verður Bíbiltími við Niels Jacob Hielsen. ápostlasøgan kap.4. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Rituvík
Leygarkvøldið
Kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin
Kl. 14, sunnudagsskúli
Kl. 19, 7 Lestrar í Rituvíkar kirkju og sungnir verða jólasangir.

### Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 sunnu-dagsskúli. Kl. 18 møti v/Margeir Toftegaard og Klæmint Sólsker, Manskórið syngur. Innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Meinigheitshúsinum í Havn
Leygardag kl. 13 Kvinnur í bøn. Í loftstovuni í Meinigheitshúsinum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17 Møti, Sang og Vitniløta lovsangsbølkurin í húsinun luttekur.
Øll eru hjartaliga vælkomin

### Meinigheitshúsið, Vágur
Sunnudagin Einki møti.

### Sunda pensionistafelag
Jólaveitslan verður í Bygda-húsinum í Hósvík 12. des. kl. 17. Seinasta freist at tekna seg er mánadagin 7. des. Á telefon 271073 ella 422152. Minnist til at hava jólapakka við. Bussur koyrir frá streyminum. Nevndin

### Tilhaldið Hugnin í Sandoy
*Tilhaldið Hugnin hevur opið mánadag, mikudag og hósdag. Allar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*
Mánadagin 30. nov. Vit gjøgnumganga skránna fyri desembur. Mikudagin 2. des. Myndaveving við Súsonnu í Jákupsstovu. Hósdagin 3. des. Myndaveving við Súsonnu í Jákupsstovu.

### Pensionistafelagið í Havn
Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Telefon: 22 27 33 E-mail: finnurj@post.olivant.fo

### Eldrafelagið Nón
Opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Losjan í Havn,
*Tinghúsvegur 18*
Fríggjadagin kl. 17 verður jólahugni

*Framhald á síðu 33*